# Suðuroy, Sandoy og útoyggjar aftur hóttar av verkfalli

JASPUR VANG



Nú hóttanin um at taka oyggjarnar sum gíðslar í einum møguliga komandi verkfalli aftur hongur yvir høvdinumá okkum, eigurtað at vera eitt ófrávíkiligt krav frá Suðuroyingum, Sandoyingum og fólki á útoyggj, at landspolitikararnir kennast við sína ábyrgd og - um tað gerst neyðugt - við lóg steðga afturvendandi áganginum móti pørtum av landinum.

Tað er ongin ivi um, at samráðingarnar millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið, sum nú eru, kunnu gerðast bæði harðar og drúgvar, nú landsbúskaparliga gongdin í landinum sum heild er rætta vegin, samstundis sum løgtingsval aftur nærkast og andstøðan á Løgtingi tí neyvan fer at gera arbeiði hjá fíggjarmálaráðharranum lættari. Vit skulu eisini minnast til, at tað ikki bert eru sáttmálaviðurskiftini hjá Starvsmannafelagnum, sum skulu greiðast, men at starvsfólkini umborð á strandfaralskipunum eru umboðað av eini 4 fakfeløgum og vandi tí er fyri, at oyggjarnar verða verkfallsraktar fleiri ferðir, so hvørt sáttmálarnar skulu endurnýggjast.

**Fjølmiðlarnir og politikararnir**

Tað er at fegnast um og ábyrgdarfult blaðmannaavrik, at blaðmaðurin á Sosialinum, Áki Bertholdsen, í farnu viku varpaði ljós á samráðingarnar og harvið varpaði ljós á vandan fyri, at verkfall aftur skal raka strandsfaraskipini, sum eru lívæðrin til oyggjarnar, eins og hann kon-fronteraði landspolitikararnar við støðuna, sum enn einaferð kann koma í. Hjá landspolitikarunum ber tí ikki longur til at lata sum um verkføllini koma óvart á. Tað er eisini at fegnast um, at tingmaður sambandsfloksins í Suðuroy og javnaðartingmaðurin í Sandoy, sum báðir eru í samgongu, hava tikið støðu í málinum og um neyðugt eru til reiðar at løggeva á økinum. At tjóðveldisumboðið í Suðuroy, sum andstøðulimur ikki vil svara beinleiðis, hvørt hann um neyðugt fer at taka undir við at tryggja siglingina við lóg, var væntandi, meðan tað er skuffandi at vera vitni til, at álit javnaðarfloksins í samgongu - hóast alt valdur í Suðuroy - hinvegin nærmast yppir øksl og bert staðfestir, at tað, sum higartil er gjørt í málinum frá landspolitiskari síðu, "ikki er gott nokk". Slíkt kann ikki brúkast til nakað sum helst. Í longdini ber ikki til, bert at halda seg flótandi við tosi og taktikki, men glíða av, tá á stendur. Enn verður tó í spenningi bíða eftir greiðum útmeldingum, serstakliga frá hinum báðum javnaðartingmonnunum úr Suðuroy.

**Vinnan bløðir og sjálvsøgd mannarættindi verða skerd**

Øll vita vit, at vinnulívið úti um oyggjarnar, har arbeiðsloysið framman undan er størst, arbeiðið mest óstøðugt og miðalinntøkurnar lægstar, so at siga verður lagt lamið, hvørja ferð verkføllini leggja samferðsluna lamna, eins og fólk verða forðað í sínum dagliga virki og sjálvsøgdu rættindi teirra til frítt at ferðast í landinum, verða tikin frá teimum. Verkfallsvandin, sum hongur yvir okkum, skapar ótryggleika í vinnuni og skerjir eitt nu íløguhugin í teimum pørtum av landinum, har alment virksemi ikki er høvuðsgrundarlagið. Í hesum døgum eru vit m.a. vitni til, at eitt av størstu arbeiðsplássunum á Tvøroyri, Føroya Fiskavirking, sendir arbeiðsfólk í hópatali til hús, eins og vandi er fyri, at virkið kemur at standa stongt stóran part av árinum, um ikki lønandi vinna aftur fæst í lag. Landspolitikararnir og fakfeløgini mugu vísa ábyrgdarkenslu og samfelagssinni, soleiðis at tað ber til at reka vinnuligt virksemi úti um landið – serstakliga innan okkara høvuðsvinnu – og er álitið á flutningssambandið millum oyggjarnar ein týðandi partur av fortreytunum, sum eru galdandi.

**So høgligt og ómakaleyst**

Tað tykist so høgligt og ómakaleyst at taka oyggjarnar sum gíðslar, hvørja ferð ósemjur stinga seg upp á arbeiðsmarknaðinum. Í Sosialinum fríggjadagin tann 15. september sóu vit, at formaðurin í Starvsmannafelagnum legði eftir landspolitikarum, sum, um neyðugt, eru til reiðar við lóg at tryggja vinnulívinum og fólki í útjaðaranum arbeiðsfrið og vanlig mannarættindi, eins og skjýtur teimum í skógvarnar, at teir reka floks – og lokalpolitikk. Fakfelagsformaðurin nýtir her vanligu útslitnu snilduna, sum vit kenna hana frá landspolitikki, hvørja ferð mál viðvíkjandi útjaðaranum eru til viðgerðar. Hvørt snildan í hesum føri verður nýtt sum skálkaskjól fyri at fjala út yvir, at fakfelags-formenn við jøvnum millumbilum eisini standa fyri vali, og tí royna at tekkjast tí øki, har tær flestu atkvøðurnar kunnu væntast, skal verða ósagt. Í ávísum førum er tó ikki so stórur munur á fakfelgspolitikki og landspolitikki, tá saman um kemur.

**Ov lítil vilji frá báðum pørtum**

Um so varð, at manningarnar á strandfaraskipunum fingu í boði at gerast tænastumenn, ella at verða settar í starv við tænastumannalíknandi treytum og fakfeløgini góðtóku eina slíka skipan, varð ikki talan um at skerja verkfallsrættin, men at bjóða starvsfólkunum betur setanarviðurskifti. Hesin framferðarháttur varð m.a. nýttur fyri at tryggja flogferðsluna móti verkføllum og hevði verið eins væl nýtiligur, hvat strandfaraskipunum viðvíkur. Neyðugur landspolitiskur vilji hevur tó ikki verið til, á hendan hátt at tryggja oyggjarnar eins og flogferðslan varð tryggjað, samstundis sum fakfeløgini ikki hava verið sinnað at lata samferðsluna millum oyggjarnar frá sær sum verkfallsvápn.

Sjálvsagt skulu vit sum framkomið samfelag virða frælsa samráðingarrættin og harvið verkfalls-rættin. Mark má tó vera fyri, í hvønn mun samfelagið ferð eftir ferð loyvir, at partar av landinum verða lagdir lamnir og at ótryggleiki støðugt skal valda. Í londunum uttan um okkum, er tað als ikki vanligt, at ávís øki í londunum í tíð og ótíð verða tikin gíðslar, soleiðis sum verkfallsrætturin ferð eftir ferð hevur verið misnýttur til at skaða Suðuroynna, Sandoynna og útoyggjar. Tí mugu vit staðfesta, at atlitini til hesar partar av samfelagnum, soleiðis sum teir hava verið útpíndir av verkføllum gjøgnum árini, viga tyngri enn atlitini til verkfallsrættin.

**Tvinnir eru kostirnari, hvørgin teirra mjúkur**

Av tí at tað ikki hevur verið neyðugur landspolitiskur vilji til at tryggja samferðsluna til oyggjarnar í friðartíðum, eins og flogferðslan varð tryggjað, standa landspolitikararnir, nú ófriður aftur hóttir á arbeiðsmarknaðinum, í teirri støðu, at teir, um hóttaninar gerast veruleiki, mugu velja ímillum, við lóg at tryggja samferðsluna til oyggjarnar og harvið fáa skotið í skógvarnar, at teir skerja verkfallsrættin, ella, um dirvi til at løggeva svíkur, framvegis hava ábyrgdina av, at vinnulív og fólkið, sum búleikast úti um oyggjarnar, framhaldandi verður fyri afturvendandi seigpínandi áganginum.

Seinast verkfall var, tóktust í hvussu so er flestu samgongutinglimirnir hava neyðuga dirvið at løggeva á økinum og harvið reka landspolitik. Lat okkum tó vóna, at samráðingarpartarnir koma til eina virðiliga loysn, so tað ikki gerst neyðugt at løggeva.

Á Tvøroyri
tann 17. september 2006.

# Skal Hoyvíksavtalan splintrast?

HILMAR SIMONSEN



Knústar fløskur flóta yvir alt í føroysku náttúruni. Hetta er til stóran ampa fyri bæði børn, vaksin fólk og fæ. Samstundis vil stjórin í Føroya Bjór hava Hoyvíksavtaluna útsetta ella strikaða, tí hon fer at geva glasfløskum kapping.

Í seinastuni hevur stjórin á Føroya Bjór gjørt vart við, at hann ikki er fegin um Hoyvíksavtaluna, tí hon millum annað fer at lata upp fyri innflutningi av øli og sodavatni í blikkum og øðrum einnýtisíløtum úr grannalandinum fyri vestan.

Eingin kann siga hann ringan fyri, at hann roynir at gera sína vinnupolitisku ávirkan galdandi í egnum heimlandi og forða fyri, at hansara fyritøka fær kapping frá útlendskum fyritøkum, sum eisini framleiða øl og leskidrykkir. Hann hevur víst á, at Føroya Bjór hevur gjørt íløgu í eina fløskuretur skipan, og at hetta er ein feilíløga, um íslendskir drykkir í einnýtisíløtum koma at standa á føroysku keypmanshillunum.

Ein hevur mangan undrast á, hví tað er loyvt at selja drykkir í glasfløskum í Føroyum, tá tað ikki er loyvt at selja í blikkdósum. Serliga torskilt blívur tað, tá grundgevingin fyri tílíkari løggávu verður søgd at vera, at glasfløskur eru meiri umhvørvisvinarligar enn blikkdósir!

Gongur tú ein túr eftir Havnargøtum ein vanligan dag, so kanst tú vera so gott sum 100 % vísur í, at tú rennir teg í eina rúgvu av sorlaðum fløskum – tað verið seg eftir gongubreytini, á vegnum, inni millum bygningar, inn móti húsaveggjum, í bussskýlum, og á parkeringsplássum. Eru tiltøk – eitt nú Ólavsøka – so stendur heilt av skriðuni til. Tá sleppir tú at brúka náttina til at pilka glassplintur úr svartaskónum.

Hevur Føroya Bjór gjørt íløga í eina maskinu, sum verður torfør at vinna inn aftur, um glasfløskur fáa kapping frá øðrum emballagum, so er tað harmiligt fyri Føroya Bjór. Men tað kann ikki vera rætt at smíða ella splintra landsins lógir soleiðis, at bann verður sett móti fríari kapping av drykkum, tí Føroya Bjór hevur gjørt íløgu í eina maskinu. Serliga ikki um umhvørvið skal gjalda prísin.

Vildu politikarar umhvørvinum væl, so áttu teir at løggivið soleiðis, at munandi hægri pant varð lagt á øll sløg av emballagu. Ein króna fyri eina fløsku er so láturligt, at eitthvørt smábarn heldur gevur eini liggjandi fløsku eitt spark, so hon fer í knús, enn at samla hana upp.

Varð pantið fyri eina fløsku sett upp í 10-15 krónur, so høvdu vit helst sæð eitt reinari umhvørvi. Tað sær út til, at tað má svíða í pengapunginum, áðrenn tað munar nakað.

Lat tað loksins verða nevnt, at tað ber væl til at leggja pant á blikkdósir, so sum gjørt verður í Noregi til dømis – umhvørvinum at gagni.

# Ferðing millum miðøkið og útjaðaran

MARNER TAUSEN
suðuroyingur

Fyri stuttum var politikari úr útjaðaranum frammi við kravi um, at tað skal verða bíligari at ferðast millum miðstaðarøkið og útjaðaran.

Politikarin var heldur ikki hesaferð úr Suðuroynni – hann var úr Klaksvík, og hann kravdi gjøgnum útvarpið, at tað skal verða helvtina bíligari at ferðast gjøgnum Norðoyatunnilin. Hann hevði eisini eitt ítøkiligt boð uppá, hvussu hetta skal fíggjast. Avdráttartíðin fyri láninum skal leingjast, og skattgjaldarin skal gjalda restina.

Sum flestu onnur, ið mugu gjalda fyri at koma inn í miðstaðarøkið, eri eg samdur við honum i, at bøtast má munandi um umstøður okkara, at ferðast millum miðøkið og útjaðaran. Øll væl lærd skilafólk hava í áravís sagt okkum, at tú kanst ikki menna útjaðaran, um tú ikki hevur gott samband við meginøkið.

Landið eigur Norðoyatunnilin, Vágatunnilin (partafeløgini) og Smyril. Tá fólk, sum ferðast úr miðøkinum norðureftir og vestureftir, kunnu keypa kubbar fyri hálvan prís, ja, so eiga fólk, sum ferðast suðureftir, sjálvandi eisini at kunna keypa somu "kubbar" fyri sama prís.

Føroyingar hava higartil staðið saman og víst samhaldsfesti á flestum samfelagsøkjum – eisini tá talan hevur verið um at menna miðstaðarøkið. Samfelagsfrøðingur hevur nýliga víst á, hvat útjaðarin hevur mist í kappingarføri, fyri at miðøkið kundi mennast.

Miðøkið blómar nú, men tað ger partur av útjaðaranum ikki. Tí er nú tíð uppá, at føroyingar við opnum sinni mugu venda eygunum móti tí partinum av landinum, sum ikki er væl fyri.

Tíð er eisini pengar, verður sagt. Eingin kann longur góðtaka, at bíðitíðin at sleppa til útjaðaran (her Suðuroynna) er hin sama sum fyri 20 árum síðani. Hetta kostar dýrt í kappingarføri.

Samhaldsfasti hugburður okkara má gera, at tað ikki er munur á ferðakostnaði úr Vágum, úr Norðoyggjum og úr Suðuroynni. Stutt sagt: fleiri túrar og bílig 10-túrakort (ella kubbar, sum eru galdandi fyri undirsjóvartunlarnar og Smyril). Kundu vit funnið semjur um hetta, var nógv vunnið. Ber hetta ikki til, mugu vit ásanna, at solidaritetur – har vit bera byrðar í felag - bara er galdandi fyri nøkur.